Landssjúkrahúsið



# IPLS - fasilitator útbúgving

## Læra við, um og av hvørjum øðrum

# Skeiðsinnihald

IPLS stendur fyri “Interprofessionell læring og samstarv” og snýr seg um, at ymiskir fakbólkar meira skipað læra við, um og av hvørjum øðrum á ein pliktaðan hátt í samstarvi við hvønn annan og við sjúklingin/borgaran

Tvey øki, sum alsamt størri áherðsla verður lagt á innan kommunala, -almanna,- og heilsuøkið, eru:

1. Tað at hava sjúklingin/borgaran meira við í avgerðum, sum hava við hann at gera
2. Tað at betra um samstarvi millum teir ymisku fakbólkarnar, bæði tvørturum fakmørk og geirar

IPLS er ein grundleggjandi tilgongd, sum kann savna og betra arbeiðið við tvørgangandi sjúklinga/borgara gongdum, sjúklinga/borgara trygd, arbeiðið við dygdarmenning, útbúgvingarplanlegging og læring.

# Fasilitering

Fasilitering verður í IPLS høpi fatað, sum ein professionel praksis, sum hevur til endamáls at hjálpa bólkum til at náa felags málum, við at leiða prosessir, sum aktivera og involvera luttakararnar. Undir útbúgvingargongdini verður áhaldandi fokuserað á, hvønn leiklut samstarvi millum teir ymisku fakbólkarnir og samstarvið við sjúklingin/borgaran hevur í hesum prosessum.

Tað er “Center for HR i Region Hovedstaden”, sum stendur fyri útbúgvingini, sum tey hava ment í samstarvi við “Centre for Interprofessional Education, University of Toronto”. Útbúgvingin verður bjóðað starvsfólkum innan heilsuverkið, almannaverkið, í kommunum, á heilsuútbúgvingarstøðum og øðrum viðkomandi samstarvspørtum

## Mál og endamál

Yvirskipaða endamálið við IPLS er, at bøta um kliniska dygd, borgara/ sjúklingatrygd umframt starvsfólkatrivnað. Ein útbúgvin IPLS fasilitator er førur fyri at seta gongd á og stuðla undir toymissamstarv og toymisprosessir, dugir at seta fokus bæði á økta læring millum professiónirnar og tað at hava sjúklingin/borgaran við í avgerðum sum viðkoma honum/henni.

Fasilitatorararnir eru virðismiklir samstarvspartar fyri leiðsluna í arbeiðnum við Interprofessionellum aktvitets- og menningar

**Hevur hetta tín áhuga?**

Tilmelding fer fram við at skriva til margit.justinussen@ls.fo innan **fríggjadagin 29. apríl kl. 12.00**

**Skeiðsdagar**

Modul 1 mai: 30. og 31.

Modul 2 august: 29. og 30.

Modul 3 september: 26. og 27.

**Leiðaraseinnapartar:** 29. mai og 31. august

Prísur kr. 6.800,- pr. luttakara

verkætlanum.

## Málbólkur

Luttakararnir skulu hava EITT ella FLEIRI av fylgjandi arbeiðisøkjum:

- Verða starvsfólk sum eru um borgarar/ sjúklingar í dagliga arbeiðnum
- Verða partur av tvørfakligum toymi. Tað kann bæði verða “føst” toymir, toymir sum virka tíðaravmarkað, toymir við fakligum uppgávum og toymir við dygdar- og organisatiónsmenningar uppgávum.
- Planleggja ella luttaka í verkætlanum saman við fleiri

**Undirvísarar**

Tað eru Anette Lykke Nielson, Annette Winther Erichsen og Jette Hovedskov Nielsen, allar útbúgvingar- og menningarkonsulentar frá “Center for HR i Region Hovedstaden”, sum standa fyri útbúgvingargongdini, í tøttum samstarvi við einum interprofessionelt og tværsektorielt samansettum toymi frá “Center for HR, sektion Efteruddannelse og Kompetenceudvikling”.

**Í toyminum eru eisini**

- Jette S. Holtzmann, sektionschef, Center for HR, sektion for Efteruddannelse og Kompetenceudvikling
- Betina Kruse, HR konsulent, Strategi, Kommunikation og HR, Gladsaxe kommune
- Jana Mortensen, menningarsjúkrarøktafrøðingur, Dygdar- og menningartoymið, Pyskiatriski depilin, Landssjúkrahúsið

Saman við Annette og Jette, eru hesar við í undirvísingini.
Prógv verður bert latið, um uppmøtingin hevur verið minst 80 %.
Luttakararnir skulu vænta at brúka nakað av tíð til fyrireiking til modulini, svarandi til ca. 2—3 tímar.
Áðrenn skeiðsbyrjan, verður ein neyvari skrá send til luttakararnar saman við fyrireikingartilfari og viðkomandi greinum...Onkur grein er á enskum.
Eru spurningar, ber til at skriva til Margit Justinussen á margit.justinussen@ls.fo

Landssjúkrahúsið

**Psykiatriski depilin**

www.ls.fo